**Røða løgmans allahalgannadag 2015**

Aftur í ár savnast vit á minningardegi teirra sjólátnu, sum siður er á hvørjum ári.

Hetta er dagurin, tá øll tjóðin steðgar á eina løtu undir Merkinum, sum veittrar á hálvari stong. 1. november minnast vit tey, sum lótu lív á sjónum. Nøkur teirra doyðu í sínum dagliga yrki.

Tað verður sagt, at havið bæði bindur okkum saman og skilir okkum.

Havið er bæði farleið og forðing. Báturin var álitið. Okkara akfar á havinum, ið røkti sambandið millum oyggjarnar.
Havið – tað stóra dragandi havið – var eisini kovin, ið gav landsmonnum okkara mat í munnin og breyð á borðið.

2

Havið, báturin og fólkið. Hesi trý vóru so tengd hvør at øðrum, at orðafellið sigur, at "føroyingurin er føddur við ár í hendi".

Júst báturin og árin førdu undanfarin ættarlið út á ríkar grunnar og fiskimið. Fiskurin sum ríkidømi gav monnum á útróðri vónina um góðar løtur, at tey har heima, kvinnur, børn og gomul fingu mat og mettuna.

3

Tað vóru vetrar, tá ið tað viðraði illa, og fiskaloysi var í vikuvís. Tá var standurin ringur, og svangligt var hjá teimum, ið ikki høvdu lunnindi á landi. Í tílíkum umstøðum stóð hjálpsemi og fólksins sosiala medvit sína roynd. Ein hjálpandi hond er altíð góð, og viðhvørt er hjálpin tann lívgevandi æðrin.

Havið bæði gav og tók. Báturin sum vinnuvegur er ein søga, har sorgin er ein sjónligur tráður. Sjógvurin kravdi dýrt sítt fyri fisk og fong. Sjógvurin kravdi dýrastu ogn fólksins. Havið tók synir fosturlandsins í sín favn, tí brádliga skifti havið ham frá silvitni til ódn.

Stormurin kom óvæntað, og tað vóru bátar, ið ikki vunnu upp land.

Teir vórðu eftir har úti og fingu váta grøv. Eftir sótu konur, børn og heimafólk, ið syrgdu fyri, at heimini so ella so komu undan, hóast tey høvdu fingið sorgarboð.

Árabáturin, ið síðan fekk maskinorku og lætti um yrki á sjónum, kveikti dreymin um størri fiskifør og fremmand fiskimið. Hugsjónarfólk fingu til vega skip, ið gjørdu tað møguligt at fiska við fremmandar strendur og troyta grunnar langt frá heimligari strond.

Eisini hetta søguliga tíðarskeiðið ber døkkar litir. Langfaraskip gingu burtur, og eingin spurdist aftur. Og skaðatilburðir hendu við fremmandar strendur, tá ið partar av manningini sjólótust í uppøstum havi og lívshóttandi kringumstøðum.

Nú sjeyti ár eru liðin, síðan seinni heimsbardagi endaði, er hóskandi at nevna henda søguríka og álvarsama táttin í siglingarsøgu Føroya.

Sjómenn okkara sigldu vandasigling til frama fyri land og fólk. Tað var neyðugt at sigla til tess at breyðføða fólkið og skapa liviligari kor í landinum. Sjómaðurin hevur altíð tikið sítt tørn og sína deksvakt umborð á føroysku skútuni, ið er landið Føroyar.

6

Óttin fyri tí ókenda er væl lýstur í heimligum skaldskapi. Óttin vovin saman við longsli og kærleika. Í einari yrking lýsir Chr. Matras umstøðurnar hjá heimafólkinum, ið sita og bíða við vón og ótta. Longsulin eftir at síggja skipið í havsbrúnni, ella síggja tað daga undan nesinum.

Ella tann nervandi óttin fyri ófrættaboðum. Yrkingin kallast: Illveður, tá skipini eru farin:

*Rótan í havi, brimar við land, óløgi vaksa í hvørjum, og dunið gongur sum náttarskrímsl gjøgnum dreymar í øllum Føroyum.*

7

*Í dimmalætting møtast tveir menn,*
*teir hava so fátt á munni,*
*teir líta á fúkandi fossarnar*
*og brimið sum brýtur frá grunni.*

*Nú fara teir fámæltir báðir í hús*
*at ugga kvinnur og børn:*
*Tað er ikki vist, har skipini eru,*
*er sama rúkandi ódn.*

So gongur dunið um dagar
og nætur, til frætt er frá teim,
um teir eru slopnir við lívinum
– ella koma ongantíð heim.

Veruleikin um yrki á sjónum, sum eitt hættisligt og krevjandi arbeiði, legði lunnar undir hesar løturnar, nú vit allahalgannadag minnast tey, ið sjólátin eru. Føroya løgting avgjørdi í 1948, at allahalgannadagur skuldi verða hildin til minnis um sjólátnar føroyingar.

Síðan seinna heimsbardaga og ikki minst í okkara samtíð eru hend stór framstig, og mangir batar hjá teimum, ið balast á sjónum.

Skipini eru vorðin betri, og tøknin og nútíðar samskifti léttir munandi um óttan og tregan, tí óvissan fær aloftast eitt svar, nú frástøðan loftvegis ikki er so stór millum heimafólkið og sjómannin.

Á øllum heimshøvum sigla føroyingar. Nýggja tíðin sæst aftur í manningarlistunum, nú fleiri kvinnur eru millum tað sjófarandi fólkið.

Vit eiga dugnalig sjófólk við hollari fakligari útbúgving innan tað maritima økið. Vit fegnast um skúla, kennara og sjófólk, ið leggja eitt trygt støði undir fjølbroyttum føroyskum búskapi.

Søgan um sjófólk okkara er eisini søgan um hin einstaka og húskið hansara ella hennara.

At missa fólk á sjónum kann ikki bólkast í stórar og smærri vanlagnur. Vit eiga ongan at missa, og hvørja ferð vit missa á sjógvi, á landi ella í luftini, missa vit ein ov mikið. Sorgin um hin einstaka er sorg í fjøldini, og sorg í fjøldini er sorg hins einstaka.

Viðhvørt missa vit í góðveðri og annars tryggum umstøðum. Tilveran er størri enn menniskjan. Feigdin dregur og finnur sína rás, eisini eina stilla løtu, tá ið menn eru komnir aftur av útróðri við góðum fongi og takast við at rigga túrin av. Í hesum unniliga verki druknar annar teirra í kendum heimasjógvi við bát og støðna.

Vit lýsa Guðs frið yvir øll tey, ið farin eru í farnari tíð og í farna allahalgannaári.

Vit bera hvør øðrum gomlu føroysku heilsanina, tá ið bátur legði frá landi: Jesus fylgi tykkum!

Vit takka Vinnuháskúlanum fyri aftur í ár at veita okkum innivist.

Við hesum orðum fari eg vegna Føroya landsstýri og alla ta føroysku tjóðina at lýsa samkenslu við tykkum, ið mist hava.

Saman drýpa vit høvur í sorg.

Síðani allahalgannadag í fjør er hesin føroyingur deyður á sjónum:

***Svend Eivind Sonne Hansen, druknaði í Funningsfirði eftir at vera komin aftur av útróðri tann 21. november 2014, 83 ára gamal.***

*(Tøgn í 1 min....)*

Friður veri við minni hansara